FILMSTEIGURIN

# At kende sandheden

»At kende sandheden« er ein uppspunnin søga við festi í einum persónligum portretti av pápa Nils Malmros, Richard Malmros, sum var ein av slóðbrótarunum innan danskar hjartaskurðviðgerðir.

Filmurin, sum er ein rammusøga, byrjar í nýggjari tíð, tá tann 80 ára gamli Malmros upplivir eina røð av deyðsføllum, sum koma av einum serligum rønktuevni, Thorotrast, sum hann brúkti umleið ímóti endanum av 2. Veraldarbardaga.

Útfrá hesi rammusøguni, har faðirin við hjálp frá soninum fer ígjøgnum tær gomlu journalirnar, gongur søgan aftureftir í tíð, og verður forteljingin um eitt heilt lív. Richard hevur gingið í lívsins harða skúla, har hann sum barn í einum kreppuraktum Esbjerg undir 1. Veraldarbardaga upplivir eyðmýkingina, tá familjan verður sett út av Kongsins Fúta. Tann 11 ára gamli Richard hjálpir familjuni við at yvirliva við at arbeiða sum boðberi fyri vaskaríið Haab, sum gumma hansara Johanne eigur. Hann lærir týdningin av ídni og grundleggur eisini eitt sinn, sum seinni merkir eitt lív við plikt og sakni. Sum serskøltur í flokkinum, verður hann happaður, men uppdagar sjálvur tær ræðuligu fylgjurnar – í einum moralskum misforstáilsi – at slatra um ein vin.





Sum ungur læknalesandi í Keypmannahavn er eitt sindur av tí sosialu og moralsku byrðuni farin burtur, men ístaðin verður Richard trýstur av sínum egnu vísindaligu ambitiónum. Tað er næstan vegna gáloysni, at hann verður bundin til Eli, sum seinni gerst kona hansara.

Mitt undir øðrum veraldarbardaga verður hann tann fyrsti yvirlæknin á tí nýggju neurokirurigsku deildini í Århus. Tá hevur hann samstundis fingið eitt familjulív við konu og børnum, og fortreytir fyri eini vanligari og góðari tilveru. Men beint tá stýrir hann inn í eina kreppu...

Á gamalsaldrinum upplivir Richard Malmros, hvussu krabbameinssvullirnir byrja at vaksa fram hjá teimum fyrrverandi sjúklingunum, sum í síni tíð vórðu kannaðir við Thorotrast…




**Frumsýning**

Fríggjadagin 04.04. kl. $20^{30}$ Leygardagin 05.04. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 06.04. kl. $19^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

## HAVNAR BIO

Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Fríggjadagin 04.04. kl. $20^{00}$ Fríggjadagin 04.04. kl. $23^{00}$
Leygardagin 05.04. kl. $20^{00}$ Leygardagin 05.04. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 06.04. kl. $19^{15}$ Sunnudagin 06.04. kl. $22^{00}$




Fríggjadagin 04.04. kl. $22^{30}$ Leygardagin 05.04. kl. $22^{30}$
Sunnudagin 06.04. kl. $21^{30}$

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**

Fríggjadagin 11.04. kl. $19^{00}$ Fríggjadagin 11.04. kl. $21^{15}$
Fríggjadagin 11.04. kl. $23^{30}$

**BIO KIOSKIN**

Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.



